


MYNDIR: PRIVATAR

# Dreymakøkur úr Leirvík

– HATTA ER BARA EITT **HOBBY**, ER TAÐ FYRSTA **JÓRUN SKORHEIM** SIGUR, TÁ **SOSIALURIN** SLÆR UPPÁ **TRÁÐIN**. HENNARA **FLOTTU KØKUR** ERU KENDAR OG VÆL **UMTÓKTAR**. VIT HAVA FINGIÐ NØKUR TIPP UM, **HVUSSU** HON GER, OG HVAT SKAL TIL FYRI AT **EYDNAST**



**KØKUR**
Inna Törnroos
inna@sosialurin.fo

Hello Kitty og McQueen-bilurin eru køkurnar, ið Jórun Skorheim oftast hevur gjørt. Kettan og bilurin eru sera vælumtókt millum børn, og tað er til barnaføðingardagar, at Jórun ger flestu køkurnar.

– Eg geri til brúdleyp og annað eisini, men mest er tað til føðingardagar, sigur hon.

Hon byrjaði vid køkunum fyri tveimum áðrum síðani, og enn er tað bara eitt ítriv – nakað hon fæst við, tá ið hon hevur frí frá arbeiðnum sum krambakvinna í Leirvík.

– Eg kundi hugsað mær at havt hetta sum heiltíðarstarv, men tá skulu høli eisini verða til tess. Nú geri eg tær bara heima í køkinum hjá mær sjálvum, sigur hon.

Jórun er ikki útbúgvin kondittari, men hevur starvast nøkur ár á bakaríi og lært seg nógv tann vegin.

Innihaldið í køkunum eru botnar, ið Jórun sjálv bakar, jogurtfromaga og sjokulátarómi. Uttan á er marsipan í ymiskum litum.

## INNIHALD


2 KLUMMA: KOM LAD OS BROKKE OS
4 LÍVSSØGA: MONIKA OG REBEKKA KUNOY SHARP
8 INTERVIEW: AXEL GRÉTARSSON
10 TIPS: STERKIR LITIR
12 90 SEKUND: ANNA FAROE
14 Í RANGASTRÚPAN: YMISKT ÚR MIÐLUNUM
14 UMAFTURAFTURUM: HØGNI DJURHUUS
18 TÍÐIN: HEILSA, TØKNI OG ANNAÐ
19 TIL ARBEIÐIS: SIGRÚN BREND
20 INTERVIEW: ANNIKA SMITH
24 BAKGRUND: LIBERALISTISK SJÓNARMIÐ HÓTTA GAMLA FEUDALSKIPAN
26 KAPPINGAR: VINN GÓÐAR VINNINGAR
30 MIÐLAMJARR: TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM
31 TAÐ HENDIR: KONSERTIR, TILTØK, BØKUR OG ANNAÐ
32 VIKUMYNDIN: TØGN Í CHRISTCHURCH


## KLUMMAN



*Eydna Skaale*

# Kom lad os brokke os...

Lat tað vera sagt beinanvegin. Eg elski føroyingar. Eg haldi, at vit eru eitt deiligt fólkaslag. Fitt, fryntlig og alt sovorði. Men halt kipp, sum vit eru nakrir grenjigákar.

Vit elska at brokka okkum – um alt.

Vit grenja um politikararnar – tað er jú altíð eitt deiligt evni, sum øll kunnu taka undir við. »Politikararnir eru klovnar«, siga vit, og so taka øll undir við okkum. Tað er líka so vist, sum tá vit knarra um veðrið. Tá er eisini 100% undirtøka. Veðrið er keðiligt, og politikararnir eru býttir, og soleiðis er tað bara. Tað er púra legalt at grenja um.

Ikki tí, vit hava deiliga nógv onnur evni at knarra um eisini – tíbetur.

Vit skræða okkum um tey lesandi, sum sita í Danmark og bara skræða seg um Føroyar og føroyingarnar, sum eru her heima og skræða seg.

Tað er eisini super, at man nú kann viðmerkja á ymsum tíðindasíðum. Har kunnu vit veruliga øsa okkum. Um hvussu býtt tað er, sum journalistarnir skriva. Ella hvussu býttur journalisturin er. Um illa vil til, kunnu vit altíð grenja um tað, sum hini hava kommenterað. Tað er virkuliga ein veldig skipan.

Eitt annað grenjievni eru sendingarnar hjá sjónvarpinum, har fólk, púra ósensurerað, sleppa at siga sína hugsan um alt. Og hvat sigur fólkið so? Jú, fyri ein stóran part grenjar fólkið. Um politikararnar, um tey trúgvandi, um vantandi tolsemi, um aðrar føroyingar og um nógv onnur evni, sum eru verd at grenja um. Og reaktiónin uppá sendingina er ógvuliga hóskandi, at bæði politikarar og vanlig fólk knarra afturímóti.

Sum sagt, so elski eg føroyingar. Vit eru virkuliga herlig, tá alt kemur til alt. Til tíðir faktisk heilt komisk.

Bara spell, at vit ofta ikki sjálvi klára at síggja tað fyri berum brokki. (segði hon sjálv, sum júst hevði grenjað um grenjið hjá øllum hinum)

Sum sagt, so eru vit virkuliga herlig...



VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Monika og Rebekka Kunoy Sharp / Jens Kristian Vang